# 490.000 vitjandi

Dampurin frá geotermiska verkinum Svartsengi við Grindavík sæst langan veg á tí slætta og bera lendinum á Reykjanesi. Her liggur Bláa Lónið, ella Blue Lagoon, sum er altjóða navnið fyri dampbaðið. Tað var kanska eitt sindur tilvildarligt, at Bláa Lónið varð skapt. Meðan el- og hitavarkið bleiv bygt, varð ein kunstigur sjógvur við heitum avlopsvatni skaptur viðsíðuna av. Í sambandi við boringina tveir kilometrar niður í jørðina, kom man fram á saltvatn, sum partvís kemur frá sjónum, ið blandar seg við feska grundvatnið. Verkið leiðir 1000 tons um tíman av avlopsvatni út í Bláa Lónið, sum er ómetaliga vælumtøkt. Síðsta ár taldu tey vitjandi næstan hálva millión fólk. Vatnið inniheldur nógv mineralir, ið hava lekjandi ávirkan á persónar, sum líða av ymsum húðsjúkum. Her finst ein serlig deild fyri viðgerð av fólki, sum eru hart rakt av slíkum sjúkum.





















